# Gerster við virðismiklum broytingum



KÍF vann greitt á Team Klaksvík í Kollafirði
mynd: Álvur Haraldsen

**HONDBÓLTUR** Henrik Gerster, venjari, hevur onkursvegna broytt nógv í spælinum hjá Kyndli eftir sjey døgum. Kyndil vann uppiborið móti VÍF í Vestmanna í gjár

Uni Holm Johannesen

Stóra talvan við reyðu bókstavunum í Vestmanna vísti tað greitt. 28-31 var úrslitið. Kyndil reisti seg væl og virðiliga.

Farna vikuskiftið tapti havnarliðið heili 40-27 á heimavølli móti KÍF.

Tí hevur Henrik Gerster eftir øllum at døma fingið nógv burtur úr á venjingarvøllinum seinastu dagarnar.

Kyndil hevði skift ham frá seinast. Stríðshugurin var funnin fram, og mistøkini í verjuspælinum vóru lúkað burtur.

Tað var grundarlagið fyri einum týdningarmiklum sigri í Vestmanna.

### Skaraðu framúr

Tað vóru serliga Hans Áki Dal-Christiansen og Kristoffur Kristoffersen, sum gingu undan hjá gestunum. Við ávikavist 10 og 9 málum, stóðu teir fyri meira enn helminginum av málunum, sum Kyndil fekk.

Tað var uppiborið, at Kyndil vann.

Gestirnir vóru á odda við tveimum og trimum málum í stórum løtum av dystinum. VÍF royndi at hótta seinastu minuttirnar, men tað eydnaðist ikki.

### Uppibornir sigrar

Tveir aðrir dystir vóru í bestu mansdeildini um vikuskiftið.

KÍF vann trygt á heimavølli móti Team Klaksvík. Úrslitið var 39-28.

Neistin vann uppiborið móti H71 í høllini á Hálsi. Greipuvinnararnir vunnu 31-22 á hoyvíkingum.

*uni@sosialurin.fo*

## VÍF – KYNDIL 28-31 (14-16)

Dómarar: Karstin Joensen og Kristian Joensen

**10 min.: 5-5**
**20 min.: 9-11**
**40 min.: 17-22**
**50 min.: 22-25**

**VÍF:** Áki G. Olsen 7 (1), Niels Andreasen 5, Sámal Jákup Djurhuus 5, Joen P. Høgnesen 5 (1), Magnus Muller 2, Bjarti Hansen, Agnar Joensen 1 (1), Jákup A. Joensen 1.
Venjari: Dia Midjord
**Kyndil:** Hans Áki Dal-Christiansen 10 (3), Kristoffur Kristoffersen 9, Hans Arni Thomsen 4, Josef Abrahamsen 3, Rani Ellingsgaard 3, Kenn Zachariasen 1, Rúni Johansen 1.
Venjari: Henrik Gerster
Útvísingar: VÍF 5 – Kyndil 7

## KÍF – Team Klaksvík 39-28 (20-11)

Dómarar: Dánjal Samuelsen og Heri Petersen

**10 min.: 4-1**
**20 min.: 10-5**
**40 min.: 27-14**
**50 min.: 33-19**

**KÍF:** Andrias Nielsen 7, Niklas Reginsson 6, Ingi Johannesen 6, Teitur Joensen 4, Arnbjørn Hansen 3, Pól Finnur í Hómrum 2 (1), Rúni Joensen 2, Ási Dam 2, Jákup Trygvason 2 (1), Pætur Johannesen 2, Suni Johannesen 1.
Venjari: Jan Ottosen
**Team Klaksvík:** Zarko Pejovic 7, Damir Oros 6, Sámal á Tjaldrafløtti 6, Jón Jacobsen 4, Dánjal Kjærbo 4, Jógvan Hansen 1.
Venjari: Poli J. Hansen
Útvísingar: KÍF 8 – Team Klaksvík 5

## Neistin – H71 31-22 (16-13)

**10 min.: 4-5**
**20 min.: 7-9**
**40 min.: 21-18**
**50 min.: 24-19**

**Neistin:** Heini Hanusarson 12 (1), Ingi Olsen 7, Rósing Rasmussen 4, Jón Ludvík 3, Finnur Hansson 3, Sjúrður Thomassen 1, Jákup Hentze Apol 1.
Venjari: Ingi Olsen
**H71:** Dánjal Tórgarð 6 (3), Boloan Florea 5, Hans Kári Hansen 4, Rógvi Sørensen 3, Sigmund Nolsø 2, Rúni V. Højgaard 1.
Venjari: Daniel Rapa og Petur M. Petersen
Útvísingar: Neistin 5 – H71 4x



*Uppflytararnir úr Kyndli vunnu fyrstu stigini í hesum kappingarárinum, tá liðið vann í Vestmanna*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Stjørnan setti ferðina upp

**HONDBÓLTUR** VB var á vinnarakós í hálvleikinum, men so svaraði Stjørnan aftur á útivøllinum í Vági

Uni Holm Johannesen

Svein Rógvi Nielsen Ljósstein hevur helst stimbrandi prát við sínar leikarar í hálvleikinum. Sum venjari hjá Stjørnuni hevði hann lítið at frøast um aftaná fyrstu 30 minuttirnar. VB var á odda 12-10 í hálvleikinum.

Men tá dysturin var liðugur høvdu gestirnir vunnið 34-21.

Stjørnan setti ferðina upp í seinna hálvleiki, og heimaliðið hevði ongan møguleika at fylgja við. Málini rapladu inn, og føroyameistararnir vunnu uppiborið.

### Fyrstu stigini

Kyndil er júst flutt upp í bestu deildina, og havnarliðið vann fyrstu stigini í hesum kappingarárinum í gjár.

Uppflytararnir vitjaðu í Vestmanna, har VÍF var lítið sannførandi. Úrslitið var 30-19 til Kyndil.

Serliga riggaði verjuspælið hjá gestunum væl, og heimaliðið hevði sera trupult við at spæla seg ígjøgnum.

*uni@sosialurin.fo*

## VÍF - Kyndil 19-30 (10-14)

Dómarar: Karstin Joensen og Kristian Joensen

**10 min.: 5-2**
**20 min.: 6-6**
**40 min.: 13-20**
**50 min.: 15-25**

**VÍF:** Agnas Olsen 7, Liljan Djurhuus 5, Tóra Seloy 4, Torgunn Johansen 2, Marita á Rógvi 1.
Venjari: Kári Mortensen
**Kyndil:** Anja Heinadóttir 7, Heidi Maria Akselsen 7 (1), Turið Arge 6, Guðrið Eystberg 3, Anna Sofía Hjalt Mohr 3, Randi Wardum 2, Ásleyg Súnadóttir 2, Jórun Ludvig 2, Anna Brimnes 1.
Venjari: Geir Wardum
Útvísingar: VÍF 2 – Kyndil 4

## VB - Stjørnan 21-34 (12-10)

Dómarar: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

**10 min.: 4-1**
**20 min.: 9-3**
**40 min.: 14-16**
**50 min.: 18-27**

**VB:** Gintave Lydekaite 7 (2), Svava Vestergaard 5, Rannvá Johannesen 2, Una Egilsdóttir 2 (1), Gurið Mortensen 2, Monika Samuelsen 1, Helga Kjærbo 1, Justiva Balzarviciute 1.
Venjari: Egill Steintórsson
**Stjørnan:** Durita Christophersen 10 (2), Valentina Suciu 8, Una Olsen 5, Nicoletta R. Hansen 5, Judit Hansen 4, Ella Petersen 1, Sylvia Hansen 1.
Útvísingar: VB 5 – Stjørnan 3